# Matfestivalur í Vágsbotni

Leygardagin 22. august verður Tórshavnar Matfestivalur í Vágsbotni í Havn. Tiltakið er partur av 100 ára haldinum hjá Tórshavnar Kommunu. - Tá verður høvi at uppliva tað siðbundna, tað nútímans og tað alternativa sum føroyska matmentanin hevur at bjóða. Samstundis verður ein nýggj heimasíða latin upp fyri okkum, ið hava ein alsk til mat og drekka, sigur Mortan í Hamrabyrgi, ein av fyriskiparunum. Talan er um ein matportal, har tú finnur ummælir, henta vitan og eina rúgvu av innihaldi um mat og drekka annars. Tiltakið í Vágsbotni leygardagin 22. august byrjar klokkan 14 og er ókeypis. Skráin kann lesast á nýggja matportalin grams.fo.



# eBillett.fo fær nýtt dám

Fyrr í ár varð nethandilin www.eBillett.fo lanseraður. Fyri fyrstu ferð var ein føroyskur nethandil, har tað bar til at keypa billettir til fleiri ymisk tiltøk. Støðugt hevur verið arbeitt við heimasíðuni, sum nú er vorðin meira brúkaravinarlig, so tað er lættari at keypa og selja billettir á internetinum. eBillett.fo bjóðar nú fleiri tænastur til fyriskiparar av tiltøkum. Høvuðstænastan, søla av billettum, er eisini gjørd lættari og bíligari at brúka. Vitjandi fáa nú eina enn betri uppliving. Tað er nú skjótari og lættari at keypa billettir, og tað ber til at nýta øll vanlig gjaldskort. Brúkaravegleiðingar eru at finna á heimasíðuni, soleiðis at tað er so lætt sum gjørligt hjá øllum at nýta síðuna sum tey vilja.

# 4.48 Psychosis á Psykiatriska Deplinum

**Yrkissjónleikabólkurin Tvazz fer í september at framføra ein av mest umtalaðu og sýndu samtíðarleikunum í nýggjari tíð, 4.48 Psychosis eftir ensku Sarah Kane. Framførslan verður á Psykiatriska Deplinum**

SJÓNLEIKUR
*Rógvi Nybo*
*Rogvi@sosialurin.fo*

Í september verður møguligt at fáa eina sjónleikauppliving av teimum heilt serstøku. Leikbólkurin TVAZZ framførir í Samkomuhølunum hjá Landssjúkrahúsinum (á Psykiatriska deplinum) ein av mest umtalaðu og sýndu samtíðarleikum í nýggjari tíð, nevnliga 4.48 Psychosis eftir ensku Sarah Kane.




*Tilvildarlig mynd*

### TVAZZ

Leikbólkurin TVAZZ er ein yrkissjónleikabólkur, sum varð stovnaður í 2006. Fyrsta uppseting hjá TVAZZ var leikurin Køksdrotningarnar, sum varð sýndir fyri fullsettum húsum í 2006. Árið eftir savnaði bólkurin aftur fult hús við leikinum Fundamentalisturin. Tvazz varð árið eftir boðin at framføra leikin á altjóða sjónleikafestival í Tampere. Juha Jokela, sum skrivaði Fundamentalistin, fekk í 2008 Norðurlendska dramatikara virðislønina fyri júst hendan leik.

Annar aðalsetningurin hjá TVAZZ er at skapa verkætlanir, tað verið seg eitt nú sjónleikir, framførslur, framsýningar, konsertir á høgum listarligum støði.Tvazz er eitt forum, har listafólk innan visuella list hittast – sjónleik, dans, ljóssnið, ljóðsnið, myndir, video, film og annað. Tá Tvazz er sprottið úr sjónleikaumhvørvinum verður tað fyrst og fremst sjónleikur, sum verður vørumerkið hjá bólkinum.

Heimstaðurin er Føroyar, men samstarvað verður við allan heimin. At knýta bond og skapa møguleikar fyri millumtjóða samstarvi. At bjóða listafólki uttaneftir higar og at fáa føroyskar »lista-útisetar« aftur hendanvegin at arbeiða og sjálvsagt at spæla saman við teimum, sum eru her frammanundan.

Og hin aðalsetningurin er at skapa sjónleik, sum skøvar poleraða lakkið her heima, sum torir at nerta við, at hyggja í pottin av fjaldum tabuum, klóra og kitla, ørkymla og undra.

### In yer face drama

4.48 Psykosa er ikki ein leikur í vanligari merking við plotti, karakterum, konflikt, uppspenningi og forloysing. Heldur er 4.48 Psykosa ein kvøða - ella kvørkratak? - til lívið og longsulin móti deyðanum í einum ráum, surreellum, sveimandi tóna, ið als ikki kennist sum svalligir døggdropar ein lýggjan summarmorgun, men heldur sum bítandi rakibløð á nakna húð, sum kolandi stormur í sálarinnar djúpastu skýmaskotum, djúpt har niðri, har ongin vón sýnist.

Sarah Kane skrivaði leikin 4.48 Psykosa. Hetta var síðsti leikur frá hennara hond. Hon doyði í 1999 einans 28 ára gomul. Men eftir henni lá ein røð av slóðbrótandi og nógv uppsettum leikverkum, sum vórðu spældir um alt Evropa: Crave, Cleansed, Blasted, Pheadra's Love fyri at nevna nakrar. Sarah Kane hoyrdi til unga ættarliðið av bretskum leikritahøvundum, sum í 1990'unum stormaðu fram við progressivum og kontroversiellum samtíðarleikum. Hesir leikir fingu felagsheitið In Yer Face Drama tí teir vóru ráir, skakandi, ópoleraðir og ágangandi í innihaldi, máli og skapi.

Gunnar Hoydal hevur við sínum serstaka málhegni týtt leikin 4.48 Psykosa úr enskum til føroyskt.

### Landssjúkrahúsið karmur um sjónleik

So frá svarta gálgaskemtinum í Køksdrotningunum til átrúnaðarligt tilverukegl í Fundamentalistinum fer TVAZZ nú við leikinum 4.48 Psykosa víðari í síni rannsókn.

Hesaferð verður tikið um enn eitt risastórt tabu-evni, nevniliga tunglyndi og sjálvmorð.

Framført verður úti í Samkomuhølunum/Veitsluhølunum hjá Landssjúkrahúsinum.

**Luttakarar:**

| | |
|---|---|
| Leikstjórn: | Egill Anton Heiðar Pálsson (úr Íslandi) |
| Týðing: | Gunnar Hoydal |
| Leikari: | Gunnvá Zachariasen |
| Ljóssnið: | Egil Barclay Høgenni Hansen |
| Tónleikur: | Rasmus Rasmussen |
| Myndir: | Marianna Mørkøre |
| Framleiðsla: | Oddvá Nattestad |

Á Samkomuhølunum í Landssjúkrahúsinum frá 12. september.

Mentamálaráðið, Nordisk Kulturfond, Mentanargrunnur Landsins, Dansk-Færøsk Kulturfond, Tórshavnar Kommuna, Fjølrit, Atlantic Airways, P/F Skrivaragøta og Vodafone stuðla verkætlanini.

# Staðfesta enn fleiri tilburðir av H1N1

**Nú hava íalt 90 fólk fingið staðfest krímsjúkuna H1N1 í Føroyum. Talið av staðfestum tilburðum er sostatt vaksið nógv seinastu 2 vikurnar.**

H1N1
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Síðani seinastu fráboðan 5. august hava føroysku heilsumyndugleikarnir staðfest 46 nýggjar tilburðir av Influensu A (H1N1). Hetta merkir, at umleið 5 nýggir tilburðir eru staðfestir um dagin. Soleiðis hava tilsamans 90 fólk fingið staðfest beinkrímið í Føroyum. Hóast fleiri hava fingið staðfest H1N1 í Føroyum, so meta heilsumyndugleikarnir sum heild, at fólk ikki eiga at vera stúrin. Alt bendir framvegis á, at talan er um eina milda krímsjúku, ið hasar av eftir fáum døgum. Tó eru nakrir vandabólkar, ið eiga at vera serliga ansnir.

### Serligir vandabólkar

Hevur tú niðursett lungavirkni, astma, hjartasjúku, diabetes ella niðursetta immunverju, skal tú verða serliga ansin. Um so er, skal tú seta teg í samband við egnan lækna, um tú ella onkur í húsinum fáa influensa.

Barnakonur, sum fáa influensusjúkueyðkenni og foreldur at børnum undir 2 ár við influensueyðkennum, eiga eisini at seta seg í samband við lækna.

### Sjúkueyðkenni

Sjúkueyðkennini eru knappliga íkomin sjúka við yvir 38° Celsius, sjúkueyðkenni frá andaleið (vanliga ilt í hálsi og hosti) og pína í vøddum. Leyst lív kemur fyri.

### Góð ráð

Í sambandi við at H1N1 krímsjúkan av álvara hevur fingið fastatøkur í Føroyum, hava heilsumyndugleikarnir latið úr hondum eina leiðbeining við góðum ráðum. Í seinastu viku eru settar upp plakatir við góðu ráðunum á ymsum almennum støðum so sum skúlum, dagstovnum, kommunulæknaviðtalum, sjúkrahúsum, røktarheimum. Góðu ráðini eru:

- Vaska hendurnar ofta
- Hosta ella njósa í ermuna
- Verð heima, um tú ert sjúk/ur

Far ikki til fólk, ið eru sjúk, uttan neyðug ørindi. Gerst tú sjúk/ur, so verð heima. Gongdin við krímsjúkuni er mild hjá teimum flestu og er av eftir fáum døgum í songini. Kennir tú teg serliga ússaligan, ring so til lækna ella læknavakt

Influensa A (H1N1) er eitt nýtt virus, sum upp á stutta tíð hevur spjatt seg um allan heimin. Í allar flestu førum er sjúkan mild og hæsar av eftir fáum døgum. Kortini er tað týdningarmikið at avmarka smittuna.